# Einki ólavsøkulag í Keflavík

Føroyski landsliðsspælarin Símun Samuelsen og liðfelagar hansara taptu ólavsøkuaftan 3-2, tá ið teir vitjaðu oddaliðið FH á Hafnafirði. Støðan í hálvleikinum var 2-2, og fyritreytirnar hjá Keflavík tóktust vera góðar, tá ið Sverrir Garðarsson á heimaliðnum longu í 34. minutti sá reyða kortið.Longu í 6. minutti legði Keflavík seg á odda. FH javnaði tveir minuttir seinni, og í 20. minutti var FH á odda. Ellivu minuttir undan steðginum misti FH ein mann, og tá ið Keflavík fýra minuttir undan steðginum javnaði til 2-2, tóktist tað síggja bjart út hjá Símuni Samuelsen og liðfeløgunum. Men FH er ikki oddalið fyri einki. Teir megnaðu at halda tætt í verjuni, og seytjan minuttir fyri leiklok skoraðu teir sigursmálið. Næsti dysturin hjá Keflavík verður 9. august, tá ið Breiðablik fer at vitja í Keflavík.




# Meiri kapping til Súna

Súni Olsen stríðist fyri at vinna sær pláss á AaB miðvøllinum, og nú verður kappingin uppaftur størri. Fríggjadagin keypti AaB ein miðvallara spælara afturat. Talan er um 24 ára gamla Benedict Vilakazi úr felagnum Orlando Pirates í Suðurafrika. Ítróttarstjórin í AaB, Lynge Jacobsen, sigur við heimasíðuna hjá felagnum, at keypið ber við sær, at teir fáa uppaftur fleiri streingir at spæla uppá. -Nýggi spælarin hevur góðan bóltførleika, og hann hevur dygdir bæði í verjupartinum og framrættaða spælinum, sigur Lynge Jacobsen. Benedict Vilakazi hevur spælt 30 landsdystir fyri Suðurafrika, og sáttmálaskeiðið millum hann og AaB er fimm ár.



acobsen, tá hon við sigrinum á ólavsøku vann sína 50. FM-róður

Mynd; Álvur Haraldsen

# fantastiskur

ingini aftan fyri Hvessing, og hetta var eisini árið, tá Jannie Dam Jacobsen og Eivy Olsen fyri fyrstu ferð vóru at finna umborð á Jarnbardi.

Árið eftir, í 1997, vann Jarnbardur aftur meistaraheitið, og síðani er tað blivið til seks meistaraheitið og eina ørgrynna av sigrum, og øll hesi árini hava bæði Jannie og Eivy verið við at manna bátin við undantaki av 1998, tá Eivy ikki var við.

**Jannie fekk sín 50. sigur**

Tey, sum høvdu bíða spent eftir 50. sigrinum hjá Jannie, fingu tað, sum tey komu eftir, tí Jarnbardur vann sum áður sagt enn ein sannførandi sigur á ólavsøku. Sostatt náddi Jannie sum tann fyrsti rógvarin í Føroyum yvirhøvur at vinna 50. stevnusigrar, og hetta má metast at vera sera flott.

Eftir róðurin funnu vit fram til manningina umborð á Jarnbardi, og har fingu vit eisini orðið á Jannie sjálva, og hon var ómetaliga glað fyri teir sjey sigrarnar í ár og FM-heitið.

- Hetta var bara super, og tað kundi snøgt sagt ikki verið betri, var tað fyrsta, sum stolta róðurskvinnan segði.

Hon helt tað eisini vera nokk so serligt at vinna 50. stevnuna.

- Ja, hetta er ræðuliga stuttligt at fáa at vita, at man er mest vinnandi í Føroyum.

Annars er vert at leggja afturat, at Eivy Olsen, sum byrjaði umborð á Jarnbardi í 1996 saman við Jannie, hevur vunnið 48 stevnusigrar, tí hon var ikki við á bátinum í 1998, tá tær vunnu tvær bygdastevnur.

# Endaðu við enn einum gullið

**Fleiri av monnunum umborð á Eysturoyingi hava boða frá, at teir gevast eftir hetta kappingarárið, og endin hjá teimum kundi sostatt ikki verið betri**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eysturoyingur hevur verið eitt av fremstu 10-mannaførunum nógvu tey síðstu árini, og aftur í ár høvdu teir vunnið sannførandi á hvørjari stevnu undan ólavsøkuni.

Og ólavsøkuróðurin bleiv einki undantak í so máta, tí Eysturoyingur vann enn einaferð rættiliga trygt, sjálvt um Vestmenningur gjørdi alt fyri at royna at trýsta teir umborð á Eysturoyingi.

Fleiri av monnunum umborð á Eysturoyingi høvdu undan ólavsøkuni boðað frá, at hetta gjørdist teirra síðsti róður – í øllum førum á hesum sinni – og tí var spennandi at fylgja við, um teir fóru at fáa væntaða sigurin. Teir, sum ætla sær at gevast, fingu sigurin, sum teir sjálvandi høvdu ynskt sær, og hetta gjørdist sostatt endin hjá hesari manningini á Eysturoyingi.

Fólk, sum fylgja væl við Eysturoyingi, nýtast tó ikki at vera bangin fyri framtíðini hjá flaggskipinum inni í Runavík, tí manningin umborð á Heiðabátinum hevur bæði væl og virðiliga víst, at nógvir góðir mans standa klárir at taka við umborð á Eysturoyingi.

Eftir síðsta róðurin á árinum fingu vit orðið á Livar Nysted, sum rør við Eysturoyingi, og hann var sera glaður um árið.

- Hetta er veldugt. Eg haldi, at hetta man vera fyrsta ferðin leingi, at nakað 10-mannafar hevur vunnið allar róðrarnar í einum ári.

- Vestmenningurin hevur tikið seg øgiliga nógv fram síðstu róðrarnar, og róðurin í dag var eisini rættiliga spennandi og harður. Tað er tó sera týdningarmikið at vinna ólavsøkuróðurin, og eg haldi, at vit róðu ein sera góðan róður í dag, og við hesum eydnaðist okkum eisini at vinna ólavsøkuróðurin, segði Livar Nysted at enda.

# – Tað kundi ikki gingið betur

**Við sigrinum á ólavsøku vann Heiðabáturin allar sínar róðrar í ár, og bátsformaðurin var sum vera man væl nøgdur. – Tað kundi ikki gingið betur, men tað kom óvæntað á okkum, at tað skuldi ganga so væl**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Heiðabáturin hevur verið í einum flokki fyri seg hjá 8-mannaførunum í ár, og sum ein av trimum bátum hevur Heiðabáturin megna at vunnið allar sínar róðrar hetta kappingarárið.

Gula 8-mannafarið hjá runavíkingum hevur ikki bert vunnið allar sínar róðrar í ár. Teir hava nevniliga vunnið rættiliga sannførandi á øllum stevnunum, og tað er júst av hesi orsøk, at teir ólavsøkuaftan støðu sum vinnarar í bæði FM-kappingini og av ólavsøkuróðrinum.

Eftir róðurin á ólavsøku fingu vit orðið á Sámal Einarsson, sum er bátsformaður umborð á Heiðabátinum, og hann var sum vera man fegin um góða úrslitið í ár.

- Tað kundi ikki gingið betur, men tað kom tó óvæntað á okkum, at tað skuldi ganga so væl, sigur Sámal.

Hann helt eisini, at manningin umborð á Heiðabátinum hevur dugað væl at hildið høvdið kalt í avgerandi løtum.

- Vit hava havt góðar royndir í at koma fram um beinan vegin í ár, og tí hava vit eisini dugað væl at hildið høvdið kalt í gjøgnum árið, tá vit eru komnir fram um.

Hann helt ikki, at tað var so lætt at rógva róðurin á ólavsøkuni.

- Tað var rættiliga ófantaligt at byrja við, og tað var ringt hjá róðursmanninum at siga okkum, hvussu støðan var. Tá vit komu inn um molan gjørdist tó betri at rógva, og tá gekk alt nógv betri hjá okkum.

At enda staðfesti Sámal ein stórsmílandi bátsformaður, at hetta kundi ikki verið betri.

- Sjey gullheiðursmerki og eitt meistaraheitið. Hetta kundi ikki verið betur hjá okkum.